# at fara leygardagin

at vera – og eru – ellisakfør, so hetta hóskaði bara væl.

At sleppa so tíðliga merkti eisini, at koyrast kundi í Norðoyggjum, innan hátíðarhaldið seinnapartin. Lagt varð til brots heilt norður á Viðareiði. Har ein sera góður biti fekst frá Elisabeth, ið er ættað úr Vági, og rekur matstovu á Viðareiði. Síðani tóku menn sær av løttum og hugdu seg um í góðveðrinum á Viðareiði.

Leiðin gekk so til Kunoyar og eftir hesa ferðina stevndi fylgið aftur til Klaksvíkar, tí nú nærkaðist løtan, tá fyrstu akførini alment komu ígjøgnum nýggja tunnilin og hátíðarhaldið í Klaksvík byrjaði í dýrdarveðrið.

Og tað var ein góð løta í Klaksvík. Afturvið góðum og glaðum jazzi frá dugnaligum bólki úr Noreg, fekst kaffi og partur av stóru tunilskøkuni. Høvi var at hitta vinir og kenningar, tí her var nógv fólk - sum á ólavsøku, sum tikið verður til.

Og tá ein partur av fylginum aftur stevndi til Havnar og umborð á Smyril, var bilrøðin í nýggja tunnlinum so long, at áfast var heilt til Leirvíkstunnilin og bilar komu í hópatali allan vegin úr Havn.

Komnir umborð á Smyril var størsti parturin av ferðini lagdur afturum og klokkan 22 gekk leiðin heim til húsa. Parturin av fylginum, sum varð verðandi eftir í Klaksvík, fór seinni til Runavíkar at liggja nátt og koyrdi síðani allan sunnudagin í Eysturoynni og har á leið, fyri at fara umborð á Smyril og til hús sunnukvøld.

Ein ógloymandi ferð á tveimum hjólum fekk ein enda, norðoyingar fingu tunnil og suðuroyingar eina góðan túr og frítt at fara norðeftir, tá alt hátíðarhald var av. Men upplivilsini eru avgjaldsfrí og kunnu heintast fram ókeypis. Og tunnilin er eitt frambrot, ið er norðoyingum, og føroyingum annars, væl unt, og sum peikar fram á ta kós, ið samferðslan sum heild eigur at stevna.








## 1. mai 2006: Tann kúgaða ófrælsa fjøldin - Stættastríðið mikla

*Privatiseringsørskan kúgandi, trælkandi*
*gevur ríkmonnunum kapitalistunum*
*teim fáu*
*fólksins ogn - eyðræning*

*myrkrið fjalir*
*okkara vakra land*
*høgrarákið latið*
*sosialismuna í ein*
*kavrotnan serk*

*tann kúgaða líkasæla fjøldin*
*stendur nekta spillnakin*
*trælalyndi*
*uppreistrarhugurin*
*kódnaður av eitrandi oyðandi*
*roykinum frá*
*listilærdu spekulantunum*

*multinationalu kræddararnir*
*eins og soppar*
*oyða og drepa alt á teirra leið*
*kúgandi stættin*
*niðurbindur fjøldina*
*meðan*

*trælahandilin og trælalívið*
*hevur fríar ræsur*

*sosialistiska hugsjónin*
*vorðin ørindasveinur*
*hjá vandamikla høgrarákinum*
*stórkapitalinum - profittinum*
*privatiseringsgyrndin*
*øsur ta kúgaðu fjøldina*

*mei ei*
*hetta letur sær lynda*
*stríðshuga til verka fer*
*hevjar stríðsbrandin*
*tað blóðreyða stættastríðið mikla*
*brimar í eystanroðanum*

*vandamikla fundamentalistiska rákið*
*má dvína*
*ikki pláss fyri slíkum illgresi*
*í tí nýggja fólkaheiminum*

*tann kúgaða fjøldin ófræls vorðin*
*sætt frælsi ei vit fáa*
*fyrr enn kúgandi kapitalistarnir*

*privatiseringsómennini*
*durafjórðingin fáa*

*tá verður fagnaðarljómur*
*í gildisskála proletaranna*

*so leingi stórkapitalurin*
*spekulantarnir*
*kúga og hóreiggja sær*
*verður stættastríðið sjónligt í orð og gerð*

*gjógvin millum rík og fátæk*
*vorðin djúpari og grefligari*

*materialisman latin í*
*andaligan búna*
*vorðin so hástór, máttmikil*
*sjálvsøkin og kúgandi sum ongantíð áður*
*eins og í tí myrku miðøld*

*ósolidariski skarin í trælaserki*
*ikki medvitandi*
*bæði kúgaður og kúgandi*
*við borgarliga streyminum fylgir*
*mikið gyklaverk*

*telgja sær gudar, um gullkálvin dansa*
*hálovar stórmonnum og kapitalistunum*
*trælur í egnum húsi*
*ljómur úr farnari, myrkari tíð*
*gapandi sálarleysar einaræðisborgir*

*Vit kúgaðu vilja stríðast*
*fyri frælsi, rættvísi og solidariteti*

*tann brennandi, máttmikli, árvakni*
*solidariski skarin*
*fylkist í hóp og stríðsfúsur vil berja niður*
*tað kavráa harkaliðið*

*Kammerátar!*
*tann stríðsreyða socialisman vil sigra!*
*sigurin er í nánd!*

*Skoði samhugafylkingina miklu*
*fløðir innar í fólkaheimið*
*stríðskvæðið ljómar hátt í høll*

*– Brátt lýsir í eystri –*

*1. mai 2006*
*Sólmundur Joensen*